10 ára sáttmáli vi› Atlantic Airways

Í inniverandi ári eru settar 10 mió. kr. av, men Jørgen Niclasen skj‡tur upp, at settar ver›a 14 mió. kr. av árliga á fíggjarlógini tey næstu 10 árini til at keypa eina BELL 412 EP tyrlu

LØGTINGSUPPSKOT
Ólavur í Beiti

Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur í fiskivinnumálum, hevur nú lagt uppskot fram um tyrlutænastu. Sambært uppskotinum er ætlanin er at skipa avtaluna vi› P/F Atlantic Airways solei›is, at hon fevnir um bjarging, leiting og eftirlit. Harumframt skal tyrlutænastan røkja sambandi› vi› smáplássini og í hesum sambandi flyta fer›afólk og farm. Ein sáttmáli millum Vinnumálast‡ri› og P/F Atlantic Airways er um hesa tænastu.

Í vi›merkingunum, sigur Jørgen Niclasen, at P/F Atlantic Airways hevur bo›i› seg fram til formelt at skipa eina tyrlutænastu í Føroyum. Í løtuni røkir Atlantsflog eina Bell 212 tyrlu, sum Føroya Landsst‡ri eigur.

– Til tess at tryggja eina fullgó›a tyrlutænastu og sum li›ur í eini komandi tilbúgvingarætlan, og sum ta› eisini er sta›fest av politiska myndugleikanum, ver›ur ney›ugt vi› eini tyrlu afturat, sigur Jørgen Niclasen.

Fyrimunir og vansar

Og uppl‡st ver›ur í vi›merkingunum, at ein arbei›sbólkur hevur kanna› ymisk sløg av tyrlum og tær sum kanna›r eru, hava sínar fyrimunir og vansar alt eftir, hvør uppgávan er.

– Vi› ta› at uppgávurnar seinnu nógvu árini hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni og Færøernes Kommando hava veri› smærri bjargingaruppgávur, metir arbei›sbólkurin tí samanumtiki›, at tann frægasta loysnin er ein serútgjørd mi›alstór tyrla. Út frá hesum ver›ur mælt til, at keypt ver›ur ein »4 axes auto pilot« tyrla av slagnum BELL 412 EP, sum l‡kur settu krøv, sigur Jørgen Niclasen.

Tá tær fyrstu kanningarnar vór›u gjørdar av mi›alstórum tyrlum, var› mett, at kostna›urin av tyrlutænastni fór at ver›a umlei› 10 mió. kr. um ári›, og var› henda upphædd tí eisini sett av á fíggjarlógini fyri 2000.

– Sí›ani er komi› eftir, at ein tyrla útgjørd vi› »4 axes« er betur egna›, umframt at ney›ugt er vi› fleiri tólum. Og vi› ta› at dollarakursurin er hækka›ur munandi, ver›ur mett ney›ugt at seta 14 mió. kr. av um ári› í 10 ár, skj‡tur Jørgen Niclasen upp.

Rætting til vallistan hjá Vestmanna kommunu

KUNNGERÐ

Valevnini til kommunuvalið í Vestmanna kommunu, 21. november 2000

Listi A:
Valevni:
1. Øssur Christiansen, bilførari
2. Torbjørn Egholm, timburmaður
3. Erland Isaksen, bygdarráðslimur
4. Birgir W. Høgnesen, tryggingarráðgevi
5. Bjarni Heinesen, lærari
6. Kára Petersen, húsmóðir
7. Suni Simonsen, maskinmaður
8. Jóhannus á Rógvu, elektrikari
9. Dánial Pauli (Palli) Djurhuus, snikkari
10. Jóhan Hendrik Hansen, bygdarráðslimur
11. Agnar Nielsen, bygdarráðslimur

Stillarar:
Gunvør Jacobsen, húsmóðir
Hans Toftum, maskinmeistari
Gunnar H. Jacobsen, oljusølumaður
Fríðgerð Dam, sjúkrahjálpari
Jaspur Andreasen, arbeiðsmaður
Hallfríð Isaksen, húsmóðir
Margit í Garðastovu, bankakvinna
Árni Klein Olsen, pensiónistur
Jón Miðberg, sølumaður
Hans Petersen, savnsvørður
Símun Olsen, goymslumaður
Gundur F. Nielsen, kokkur
Jákup Hendrik Egholm, snikkari
Jón Nielsen, elektrikkari
Iris Haldansen, heimahjálp
Birgit Lamhauge, flakakvinna
Poul J. Egilsnes, hovmeistari
Áki Olsen, skrivstovumaður
Óli Klein Olsen, arbeiðsmaður
Eyðun Joensen, servicuteknikkari
Jógvan Sigurd Poulsen, sølumaður
Sigbjørn G. Skúvadal, timburmeistari
Mary Gaard, leiðari
Jákup Oluf Hansen, virkisleiðari
Vagnur Djurhuus, arbeiðsmaður

Listi B:
Valevni:
1. Hervør H. Durhuus, flakakvinna
2. Gunn Joensen, skrivstovukvinna
3. Martha Joensen, skrivstovukvinna
4. Marjun Johannesen, skrivstovukvinna
5. Andrea Nielsen, læraraskúlanæmingur
6. Marjun S. Olsen, grafikari
7. Johanna Maria Pedersen, sjúkrasystir
8. Poula Eyðdis Ennigarð, sosial- og heilsuassistentur
9. Tórgerð Simonsen, heimahjálparaforkvinna

Stillarar:
Frits Johannesen, pensiónistur
Ingunn Winther Olsen, lærari
Jákup Andreasen, skúlastjóri
Betsy Müller, flakakvinna
Sóleyð Poulsen, húsmóðir
Ingi Olsen, bankamaður
Ásla Friis, deildarleiðari
Brynhild Seloy, skrivstovukvinna
Elsa Maria Reinert, sjúkrasystir
Gyðja Hjalmarsdóttir Didriksen, lærari
Johild Akraberg Durhuus, handilskvinna
Alexandra Durhuus, húsmóðir
Sigurlaug Nielsen, lærari
Bjarki Thastrup, snikkari
Remi Thorleifsson, smiður
Heidi Petersen, lærari
Elsa Jacobsen, heimahjálpari
Bjørg á Rógvi, skrivstovukvinna
Ann K. Andreasen, skrivari
Mari Hansen, sjúkrasystir
Hallgerð Didriksen, pensiónistur
Jógvan Durhuus, løgtingsmaður
Jóhan Simonsen, skipsførari
Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður
Karl Simonsen, skrivstovumaður

Vestmanna, tann 6. november 2000
Kommunuvalnevndin
Heðin Winther Olsen, formaður

4, 94 metrar og ikki 2, 94 metrar

Álvur Enni v.m. og Róland Sørensen vi› Føroya longsta sper›li, sum var 4,94 metrar langur

Í bla›num í gjár greiddu vit frá, at tvøramenn høvdu sett n‡ttt føroyskt met – og kanska heimsmet vi› – í at stinga sper›il.

Í greinini var nakrar fer›ir nevnt, at sper›ilin var 4, 94 langur. Men eina sta›ni var ein prentvilla sníkt seg upp ímillum, tí har stó›, at hann var 2, 94.

Sjálvt um lesarin sjálvsagt veit, at 4, 94 metrar er rætta longdin, skal ta› nevnast einafer› afturat, fyri at beina allan iva burtur, at sper›ilin var altso 4, 94 langur.

Sper›ilin er ein n‡rasper›il, ella su›uroyarsper›il, sum hetta slagi› eisini ver›ur nevnt. Tvs. at hann ver›ur stungin vi› kjøti, n‡rum o.ø., og ikki bara vi› tálg, sum er ta› vanliga nor›anfjør›s. Ta› vóru Álvur Enni og Róland Sørensen á Tvøroyri, sum stungu hendan metlanga sper›ilin, i› sostatt er meiri enn tvær fer›ir so langur, sum tann, i› skopuningar fyrr í heyst kravdu at fáa føroyameistaraskapin uppá.

Samrá›ast á›renn fólki› ver›ur kunna›

Landsst‡ri› ætlar ikki at siga meira um n‡ggja sjálvst‡risleistin, fyrr enn ta› aftur hevur samrá›st vi› donsku stjórnina

Mynd: Jens K. Vang

Landsst‡ri› ætlar sær ikki at koma vi › ítøkiligum vi›merkingum til n‡ggju sjálvst‡risætlanina, fyrr enn samrá›ingar aftur hava veri› vi › danir

RÍKISRÆTTARLIGA STØ‹AN
John Johannessen

Løgma›ur hevur á Nor›urlandará›sfundinum í Reykjavík fleiri fer›ir tosa› óformelt vi› danska forsætisrá›harran, Poul Nyrup Rasmussen, um n‡ggja sjálvst‡risleistin hjá landsst‡rinum.

Men løgma›ur vil ikki siga, hvat tilfar hann hevur lati› danska forsætisrá›harranum, og heldur ikki vil hann siga, um samrø›urnar hava givi› betur útlit fyri eini semju millum Føroyar og Danmark í ríkisrættarliga spurninginum.

Løgma›ur er í veruleikanum ógvuliga tigandi, tá hann ver›ur spurdur um n‡ggja sjálvst‡risleistin hjá landsst‡rinum. Og so tigandi ætlar løgma›ur at halda fram at vera, til landsst‡ri› og danska stjórnin aftur hava siti› vi› samrá›ingarbor›i›.

– Vit hava almannakunngjørt n‡ggju koyriætlanina fram ímóti fullveldinum, men vit ætla okkum ikki at koma vi› ítøkiligum vi›merkingum til smálutirnar í ætlanini, fyrr enn vit hava samrá›st vi› donsku stjórnina, sigur løgma›ur.

Anfinn Kallsberg sigur, at ta› er á fyrsta samrá›ingarfundinum, at smálutirnir í ætlanini ver›a avgjørdir, og tí ber ikki til at melda út um teir, fyrr enn hesin samrá›ingarfundurin hevur veri›.

Gó› samrá›ingarstø›a

Helena Dam á Neystabø, landsst‡risma›ur, sigur, at landsst‡ri› gjøgnum samrá›ingarnar higartil hevur fingi› nógv grundleggjandi tilfar, sum n‡ggja ætlanin kann byggjast á.

Men Helena Dam á Neystabø vil ikki grei›a nærri frá hesum tilfari, somulei›is sum hon heldur ikki vil siga naka› anna› ítøkiligt um innihaldi› í n‡ggju ætlanini enn, at talan er um eina ætlan, har vit tøma heimast‡rislógina og ni›urlaga blokkin fram móti føroyskum fullveldi.

– Ta› er avgerandi, at vit nú var›veita gó›u samrá›ingarstø›una. Tí er best, at vit halda okkum til koyriætlanina, sum landsst‡ri› er vor›i› samt um, sigur Helena Dam á Neystabø.

Helena Dam á Neystabø vil, eins og løgma›ur, ikki siga, um danski forsætisrá›harrin hevur fingi› naka› tilfar um n‡ggju ætlanina á óformellu fundunum vi› løgmann.

– Ta› einasta, eg kann siga, er, at danski forsætisrá›harrin hevur fingi› nógv tilfar gjøgnum samrá›ingarnar higartil, sigur Helena Dam á Neystabø.

Fáa tingini upp á pláss

Eins og løgma›ur, heldur Helena Dam á Neystabø, at føroyska fólki› má bí›a vi› at fáa at vita smálutirnar í n‡ggju ætlanini hjá landsst‡rinum til fyrsti samrá›ingarfundurin vi› donsku stjórnina hevur veri›.

– Ta› er ymiskt, sum vit skulu fáa upp á pláss vi› donsku stjórnina, á›renn fólkaatkvø›una í apríl 2001, tá fóli› sleppur at taka stø›u til ein nágreiniligan spurning, sigur Helena Dam á Neystabø.

Men hvør hesin nágreiniligi spurningurin ver›ur, er torført at fáa at vita.

– Fólki› skal taka stø›u til, um vit skulu tøma heimast‡rislógina og minka blokkin ni›ur í einki eftir einum ávísum áramáli, tit vit fáa fullveldi, eru bo›ini frá landsst‡rinum.

Men áramáli› vil landsst‡ri› ikki koma nærri inn á fyrr enn eftir fyrsta samrá›ingarfundin.

Tó hevur Høgni Hoydal nevnt 2006, sum eitt mark, men hesum hava Fólkaflokkurin og Sjálvst‡risflokkurin víst aftur.

Útvarpi› bi›ur um umbering

Útvarpsstjórin bi›ur í brævi Jóannes Eidesgaard um umbering fyri, at hann í táttinum »Plettskot« var› ærumeiddur í leygarkvølds-sendingini 28. oktober

ÆRUMEI‹ING
John Johannessen

Jógvan Jespersen harmast um tilfari›, Útvarpi› leygarkvødli› 28. oktober sendi út í luftina í táttinum »Plettskot«, sum er komin í sta›in fyri speisku vi›merkingarnar hjá Høgna Djurhuus seinastu vetrarnar.

Evni› í táttinum hetta kvøldi› var ríkisrættarliga stø›an, og n‡tti Egi Dam, sum tá stó› fyri Plettskotinum, høvi› til beinlei›is og óbeinlei›is at kalla Jóannes Eidesgaard fyri landasvíkjara.

Hetta vildi Jóannes Eidesgaard ikki hava sitandi á sær, og kærdi hann tí til útvarpsstjóran um sendingina og vísti á heilar n‡ggju setningar, sum hann metti vera revsiverdar ærumei›andi skuldsetingar.

Útvarpsstjórin tekur undir vi› skuldsetingunum og ásannar í brævi til Jóannes Eidesgaard, at eingin ivi skal vera um, at í táttinum ver›ur or›i› landasvik brúkt í fleiri førum í sambandi vi› stø›utakanina hjá Javna›arflokkinum og Jóannes Eidesgaard í málinum um framtí›arstø›u Føroya.

– Eingin ivi skal vera um, at hesin táttur ikki fylgir teimum reglum, sum galda fyri programmvirksemi› hjá Útvarpinum, og hervi› skal eg útvarpsins vegna geva tær eina umbering fyri, at tátturin er sendur, sigur Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, í brævi til Jóannes Eidesgaard.

Í kæruni kravdi Jóannes Eidesgaard, at útvarpi› las upp eina umbering í tí›indasendingini seinasta mánakvøld, um hann ikki skuldi stevna útvarpsstjóranum fyri rættin. Hendan umbering var› lisin upp, og ger Jóannes Eidesgaard tí einki meira vi› máli›.



Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, harmast um at »Plettskot« fór í luftina 28. oktober